# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Fólkatalið í Beijing fer at veksa nógv, tí vit vænta nógvar nýføðingar í ár, og næsta ár verður OL*

*(kinesiskur talsmaður).*

# Fleiri koma aftan á Dean



*Dean kom í morgun inn at meksikonsku Yucatán-strondini, haðani 80.000 ferðafólk eru flýdd*

**Amerikanski veðurstovnurin væntar fleiri tropiskar ódnir í ár enn onnur ár**

Tropiska ódnin Dean, sum kom inn at meksikonsku Yucatán-strondini í morgun, er tann fyrsta av sínum slagi í ár, men sambært amerikonsku veðurmonnunum fara fleiri tropiskir stormar og ódnir at gera um seg á somu leiðum í heyst. Veðurmenninir siga, at tað er 85 prosent sannlíki fyri, at stormarnir og ódnirnar verða fleiri og verri enn meðal.

Forsøgnin hjá veðurstovninum sigur, at í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 30. november fara væntandi millum 13 og 16 tropiskir stormar at taka seg upp í Atlantshavinum við kós inn í Karibiska Havið. Sjey av stormunum fara ætlandi at menna seg til tropiskar ódnir, og av teimum vera fimm so mikið harðar, at tær mugu skrásetast í teimum ringastu bólkunum.

Síðani tann 1. juni hava sjey tropiskir stormar verið í økinum. Tann sjeyndi, sum fekk navnið Erin, gjørdi um seg í Texas í síðstu viku við nógvum regni, men hann gjørdi ikki stórvegis skaða. Sambært veðurmonnunum er tað næsta illveðrið kanska longu á veg, tí okkurt er í ferð við at taka seg upp yvir havinum eystan fyri Kuba, siga teir.

# -Tað var synd í Wolfgang

**Eitt ár eftir at hon slapp leys, heldur Natascha Kampusch, at tað var synd í manninum, sum burturflutti hana**

-Tað var synd í honum og hansara neyðars fortaptu sál.

Natascha Kampusch var tíggju ára gomul, tá Wolfgang Priklopil burturflutti hana í Wien. Í átta ár sat hon fangi í einum kjallararúmi heima hjá honum, til hon tann 23. august í fjør slapp til rýmingar. Stutt eftir tók Wolfgang Priklopil lívið av sær. Nú eitt ár seinni harmast hon tað, sum hendi burturflytara sínum.

-Mær tykir synd í honu. Hann hevði tað ikki gott, tann neyðars fortapta sálin. Eg plagdi at siga við hann, at eina ferð skuldi eg dansa oman á grøv hansara, men eg meinti tað ikki. Hinvegin vistu vit bæði, at annað okkara fór at sleppa við lívinum, segði Natascha Kampusch í samrøðu við eysturríkska sjónvarpið ORF í gjárkvøldið.

Mong undraðust á, at Natascha Kampush valdi at fylgja Wolfgang Priklopil til gravar, men hon hevði eina frágreiðing.

-Eg segði honum farvæl, og hví skuldi eg ikki gera tað? Fyri meg var tað umráðandi, tí eg hevði ikki sæð hann á lívi, síðani eg rann burtur frá honum, segði Natascha Kampusch í gjárkvøldið.




*Fyri einum ári síðani var Natascha Kampusch á hvørjari forsíðu*



# Tóku háv livandi

Í fleiri dagar hevur ein hávur órógvað gestirnar á sponsku frítíðarstrondini Tarrgona. Í gjár gjørdu myndugleikarnir av at royna at taka hávin, og nakrir kavarar fingu uppgávuna. Seinnapartin eydnaðust so kavarunum at fáa hávin í eina nót, og áhugin var stórur, tá teir komu inn á strondina við honum. Tað vísti seg, at talan er um eitt hávaslag, sum ikki ger seg inn á fólk, skrivar Reuters. Hávurin verður tí sleptur útaftur, men eitt sindur longri frá strondini.

## STUTT SAGT

### Bush fríggjar

Í USA roynir George W. Bush, forseti, at bøta um viðurskiftini við grannalondini Kanada og Meksiko. Tey eru heldur ikki serliga góð. USA og Kanada eru ósamd um økið kring Norðpólin, har Kanada hevur víst seg at vera sera ágangandi, og USA og Meksiko hava leingi verið rúkandi ósamd um teir nógvu meksikanararnar, sum flýggja um markið til USA. Í gjár hitti Bush kanadiska forsætisráðharran, Steven Harper, og meksikanska forsetan, Felipe Calderón, men sum skilst kom lítið burturúr. Ein kanadisakur talsmaður segði, at Bush og Harper eru ikki samdir, og Calderón gjørdi av at fara til hús orsakað av ódnini Dean.

### Tann fyrsti í rættin

Tann fyrsti amerikanski heryvirmaðurin, sum hevði ábyrgdina av fangaviðferðini í Abu Ghraibfongslinum í Irak, kom fyri rættin í gjár. Steven Jordan er ákærdur fyri at hava vanrøkt sítt starv og fyri at hava roynt at forða myndugleikunum at fáa greiði á, hvat veruliga hendi í fangunum í fongslinum. Hann noktaði seg sekan. Ellivu amerikanskir hermenn eru longu dømdir fyri tað, sum hendi í Abu Ghraib, men tann 51 ára gamli Steven Jordan er tann fyrsti yvirmaðurin, sum kemur fyri rættin í sambandi við málið, sum skelkaði allan heimin í 2004.

### Ov nógv fólk

Býráðið í kinesiska høvuðsstaðnum Beijing hevur fingið ein stóran trupulleika. Framtíðarætlanin hjá býráðnum sigur, at í 2020 skulu vera í mesta lagi 18 mió. fólk í býnum, men nú vísir tað seg, at fólkatalið er longu komið upp í 17 mió., skrivar almenna tíðindastovan Xinhua. Útlitini eru heldur ikki tey bestu, tí myndugleikarnir vænta, at umleið tvær mió. fólk fara at flyta til Beijing í sambandi við, at býurin er vertur fyri teimum olympisku summarleikunum næsta ár.